# Heilsurenning í Klaksvík

**Leygardagin 9. apríl kl. 14.00 verður stór heilsurenning í Klaksvík**

HEILSURENNING
*tíðindaskriv*

Tað er Føroya Shell í Norðoyggjum, sum saman við rennifelagnum Treysti skipar fyri. Umframt at renna, so kunnu luttakararnir, um teir ynskja tað, eisini mála blóðtrýstið – bæði áðrenn og aftaná tey hava runnið. Tað er Hjartafelagið, sum kemur at taka sær av hesari uppgávuni.

Áhugin fyri renning er nógv vaksin tey seinastu árini, og fyri hvørt ár sum gongur, sær man fleiri og fleiri sum renna og jogga. Hetta er bara gott, tí øll vita, hvussu umráðandi tað er at røra seg. Umframt at fáa fríska luft, so er tað gott fyri øll heilsutøl. Sjálvt um áhugin fyri renning er nógv vaksin, so eru tað fleiri, sum ikki fáa tikið seg saman, og tí halda fyrireikararnir tað verða eitt gott hugskot við hesum tiltaki.

Sum sagt, so er tað rennifelagið Treysti, sum kemur at samskipa tiltakið og útflýggja teir startnummur á startinum, sum er á økinum uttan fyri Shellstøðina. Tiltakið byrjar kl. 14.00, og verður tað formaðurin í Heilsunevndini hjá Klaksvíkar Kommunu, Rani Nolsøe sum setur kappingina í gongd. Runnið verður frá Shellstøðini og heimeftir Nólsoyar Pállsgøtu. Tá komið verður til Norðoya Sparikassa verður farið eftir Skúlavegnum og yvir til KFUM. Síðani verður runnið norður eftir Heygavegnum og oman gjøgnum Biskopstøðbrekkuna og norður aftur eftir Nólsoyar Pállsgøtu. Málið er á Shellstøðini. Av tí at tiltakið er ætlað øllum – eisini teimum sum ikki eru von at renna, er teinurin einans 3. km – tó verður eisini ein bólkur fyri rennarar sum eru vanir at renna. Hesir rennarar renna teinin tvær ferðir – t.v.s. 6 km.

Føroya Shell í Norðoyggjum hevur gjørt avtalu við Hjartafelagið um at verða á staðnum áðrenn og eftir hetta tiltak. Hjartafelagið bjóðar øllum teimum sum renna, møguleikan at fáa mált blóðtrýstið – bæði áðrenn og aftaná, um áhugi er fyri tí.

Samstundis sum hetta er ein heilsurenning, so verður tiltakið eisini skipa sum ein kapping, og tí verða luttakararnir bólkaðir soleiðis: Menn, kvinnur, dreingir sum eru føddir millum 93 og 98, gentur sum eru føddar millum 93 og 98. Dreingir sum eru føddir seinni enn 98 og gentur sum eru føddar seinni enn 98. Umframt hesar bólkar, so kunnu veteranar eisini melda seg til. Hetta eru tey sum eru fødd í 59 og áðrenn. Sum sagt, so verður eisini ein bólkur fyri rennarar, sum vilja royna teinin á 6 km.

Nummar 1, 2 og 3 í hvørjum bólki fáa heiðursmerkir og lutakast verður millum øll sum hava runnið, har vinningurin er eitt Viðskiftakort á Kr. 1.000,- frá Føroya Shell í Norðoyggjum. Á málinum bjóðar Shellstøðin kaffi og Føroya Bjór vatn. Tilmelding til tiltakið sum er ókeypis, kann gerast á Shellstøðini í seinasta lagi hóskvøldið 7. apríl.

Um áhugin vísur seg at verða fyri hesum tiltaki, so er meiningin at tað skal verða afturvendandi.



# Fyrstu lombini lembd í Vági

**Skírismorgun hoyrdust fyrstu smálambajarmini í Vági. Ein tvílemba, í Suðuroynni nevnt tvølba, hevði lembt tvey lomb - eitt svart og eitt hvítt**

LOMB
*dagfinn@sosialurin.fo*

Skírismorgun hoyrdust morgunfrísk og nýggj ljóð uttanfyri húsini hjá Hendrik Old í Vági.

Ein ær hevði lembt tvey lomb. Sostatt er ærin tvílemba – tvølba, sum tað eitur í Suðuroynni. Fyrstu lombini í Vági komu sostatt skírisdag – skertisdag, sum tað eitur í Suðuroynni. Talan er um ær, sum vanliga gongur í haganum á summri.

At koma í túnið hjá Hendriki hóskvøldið var hjartarørandi – eitt lítið hvítt lamb og mamman. Lambið jarmaði við høgum tóna, so lítið tað var. Men inni í heita køkinum var hitt lambið, tað svarta. Bæði lombini hava tað gott.

Orðatakið sigur, at tann, ið fyrst sær eitt hvítt lamb, fær eitt gott summar, og sostatt fáa mong eitt gott summar, tí mong hava spákað sær framvið hjá Old hendadagin – á veg vestur á Eiðið – í góðveðrinum.


